FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Skrivstovustarv á Náttúruvísindadeildini

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til Náttúruvísindadeildina (NVD) á Fróðskaparsetrinum.**

**Starvið**
Talan er um hálvt skrivstovustarv til setan frá 1. apríl 2006 ella skjótast til ber, har uppgávurnar í høvuðsheitinum eru at hava:
- ábyrgd av skeiðsskránni
- ábyrgd av próvtøkuhaldi
- samskifti við studentar
- annars alt vanligt skrivstovuarbeiði

**Førleiki**
Vit vænta, at tú:
- hevur skrivstovuútbúgving
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- ert ábyrgdarfull/ur og røkin
- hevur góð evni at samskifta og samstarva við onnur
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Løn**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 3. flokkur.

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum, ævisøgu (curriculum vitae) og møguligum viðmælum skulu vera NVD í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. mars 2006.

Umsóknir skullu sendast til:

**Náttúruvísindadeildin**
Nóatún 3
Postrúm 2109
FO-165 Argir

Nærri fæst at vita um starvið við at hyggja at heimasíðuni www.nvd.fo ella at venda sær til deildarskrivaran á NVD, Randi Durhuus, á tlf. 35 25 50 ella á teldupostbústað randid@setur.fo

# Pedagogur til Verkstaðið Vón

Søkt verður eftir pedagogi at arbeiða 20 tímar um vikuna. Starvið verður sett 1.apríl 2006 ella skjótast gjørligt.
Verkstaðið Vón er ein vardur verkstaður har gott 40 vaksin fólk við menningartarni arbeiða við framleiðslu.

Uppgávan hjá tí, sum sett/ur verður, er at stuðla vaksnum manni við down syndromi í dagligu lutunum á varda verkstaðnum.

Verkstaðið er opið vanligar arbeiðsdagar kl. 8.00 -16.00, arbeiðsfólkini hava aðrar arbeiðstíðir.

**Um tú hevur hug at søkja hetta starvið, vænta vit, at tú**
- Hevur evnir og hug at arbeiða við fólki við menningartarni
- Hevur góð samstarvsevnir
- Hevur evnir og hug at arbeiða í einum starvsfólkabólki eins og sjálvstøðugt
- Ert álítandi og fleksibul

**Vit kunnu bjóða tær**
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi við ymiskum fakbólkum
- Luttøku á viðkomandi fundum og skeiðum

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, og lønt stigini 11 til 18.

Nærri fæst at vita um starvið frá leiðaranum á tlf. 214288.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður send til:

**Verkstaðið Vón**
Att: Maud Wang Hansen, leiðari
Postboks 2003
165 Argir

**Umsóknarfreist 31. mars 2006 kl. 16.00.**

Gallarí Jinx

## Kokkar og køkshjálp

Gallarí Jinx søkir eftir kokkum og / ella køkshjálp til at byrja beinavegin.

Talan er um 2 fulltíðarstørv, sum koyra í vaktum.

Vit ynskja at tit vera við til at varðveita okkara góðu tænastu og í framtíðini til at verða ein partur av spennandi verkætlanum. Hesar verkætlanum koma tit, saman við leiðsluni, at hava ein týðandi leiklut í.

Vit hopa at tú og tit eru fyrikomandi, ábyrgdarfull og røsk.

Løn sambært avtalu.

Meira kunning um arbeiðið fæst við at ringja til Hans á tlf 519383.

Umsókn skal sendast til:

**Gallarí Jinx**
Heygsbreyt 12
100 Tórshavn

Ella Hans@jinx.fo

tel 317101 • jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800


## BYRJANARSKEIÐ Í RÍÐING



Ríðiskeið verður hjá BERG-hestum fyri børn, ið ikki eru von at ríða

Børn 5 til 7 ár mánadag og fríggjadag kl. 16.00
Børn 7 ár og eldri mánadag og fríggjadag kl. 17.30

Ríðilærari er Nina Brockie.

Byrjað verður mánadagin 20. mars.

**Tilmelding á telefon 316896 og 216896.**

**BERG-hestar**

# Illur???

**Sig tína meining í Sosialinum**




## HÚS Í VESTMANNA TIL SØLU



**www.birgir.krea.fo**
**RING 50 56 00**

## KVÍVÍKINGAR



**Ung sum gomul,
stór sum smá,
úti og heima.**

Nú ber til at gerast limur í bygdafelagnum Glæmuni við at flyta limagjaldið á kr. 75,- á eina av niðanfyri nevndu konti:
9191-144.755.8 / 6460 170.382.1
Giro: 203947

Sig takk í Sosialinum